# Býráðið ikki samt um barnagarðsnavn



**Jórun Høgnesen, forkvinna í sosialu deild í Klaksvíkar kommunu, er ikki samd við varðaborgarstjóran um, hvussu nýggi barnagarðurin skal eita**

BARNAGARÐUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Nýggi barnagarðurin í Klaksvík skal eita Baldursbrá, um tað stendur til Jórun Høgnesen og Eyðgunn Samuelsen, forkvinnu og nevndarlim í sosialu deild. Tær báðar siga, at síðan kommunan yvirtók barnaansingina, hevur sosiala deild verið samd um at nýta blomunøvn til sínar stovnar innan barnaansing.

Jórun Høgnesen situr í býráðssamgongu við Jákup Mikkelsen, sum í farnu viku segði, at hann ætlaði at leggja fram uppskot um, at nýggi barnagarðurin í Klaksvíkar Kommunu skuldi eita Margitar barnagarður eftir Margit Joensen, sálu.

Margit Joensen var fyrstvalda kvinna í Klaksvíkar býráð og forkvinna í sosialu nevnd, tá verkætlanin fór av bakkastokki fyri umleið 20 árum síðani.

Jórun Høgnesen og Eyðgunn Samuelsen halda, at tað ber til at fylgja siðinum at geva stovnum blómunøvn, samstundis sum minnið um Margit Joensen, sálu, verður heiðra.

- Fyri at minnast leiklutin hjá Margit Joensen, halda vit tað vera hóskandi – og í trá við samtyktina um blómunøvn - at kalla stovnin Baldursbrá, ið á donskum eitur Margerit.

Nýggi barnagarðurin er fyrsti barnagarður, sum Klaksvíkar Kommuna hevur latið byggjað, og talan er um eina 20 ára gamla verkætlan, sum nú endiliga er gjøgnumførd.

Frammanundan eru fýra barnagarðar í Klaksvík, Drotning Margretu barnagarðurin, Mylnuhúsið, Blákollan og útibarnagarðurin Fjallafípan. Ongin av hesum húsast í bygningum, sum vóru bygdir til endamálið.

Tey 64 børnini, sum sleppa at ganga í barnagarðurin á Traðargøtu hava fingið boð, og barnagarðurin letur upp 17. september.


Brekdeildin?

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



**Psst!**
Hetta er Almannastovan. Vit sóknast eftir starvsfólki. Veitst tú nógv um børn og vaksin við skerdum førleika? So átti tú eisini at vitað, hvat ið Brekdeildin er. Og so hava vit brúk fyri tær! Les meiri niðanfyri ...

Brennir tú fyri børnum, sum bera brek? Og kveikja vaksin við sama skerda førleika eisini ein loga í tær? So verður tú kanska ein av okkara eldsálum á Almannastovuni! Júst nú sóknast vit eftir deildarleiðara til Brekdeildina, ið ráðgevur vaksnum og børnum við skerdum førleika og familjum teirra.

Starvið gevur tær møguleika at ávirka, samstarva breitt og arbeiða í ógvuliga spennandi umhvørvi. Á Brekdeildini, sum er ein landsumfatandi serdeild á Almannastovuni, ráðgeva vit fólkum í øllum Føroyum. Vit á høvuðsdeildini arbeiða tætt saman við økisdeildunum uttan fyri Tórshavn. Brekdeildin samstarvar eisini við aðrar stovnar, sum veita fólki við breki tænastur; t.d. Sernámsdepilin, Serforsorgina, skúlar og ansingarstovnar.

Starvið hevur við sær innihaldsríkt arbeiði ymsastaðni í landinum.

**De**

- hevur ábyrgdina av fakligu leiðsluni á deildini
- samskipar arbeiðið á deildini
- ráðgevur vaksnum við breki
- ráðgevur familjum hjá børnum við breki
- skipar samstarv við aðrar fakbólkar
- hevur hóskandi útbúgving og arbeiðsevni
- veit nógv um almannaverkið
- megnar at kveikja og menna starvsfólk
- dugir væl at samstarva
- er førur fyri at seta fyriskipanir í verk
- kann orða seg væl munnliga og skrivliga
- hevur góðan kunnleika til EDV.

**Løn**

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Kundi tú hugsað tær nágreiniligari upplýsingar, ert tú vælkomin at venda tær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra. Hon hevur telefonnummar 35 35 10. Umsóknir við prógvum og viðmælum kunnu sendast Almannnastovuni, Smyrilsvegi 20, postsmogu 3096, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 28. august 2007.